gult30 cyan30 magenta30 svart30

TILTØK

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli í Hoyvíkar skúla vegna summarfrí. Kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Jógvan Steintún. Øll eru vælkomin.

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugranskning, kl. 11 gudstænasta, Johann Thorvaldsson. Kl. 15 brúðarvígsla.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit. Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit. Sunnudagin kl. 11 hámessa v/Benny Blumensaat í Mariukirkjuni.

Rhema á hálsi
Mikudagin kl. 17-18 bønarmøti. Fríggjakvøldið kl. 18-19.30. A.T.A.P. kids. Leygarkvøldið kl. 20 Next Generation (ungdómsmøti). Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli, Fríðtór Debes talar. Øll eru vælkomin.

Ebenezer
Fríggjakvøldið kl. 20 ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti.

Meinigheitshúsið
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Hanus Simonsen.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 17 landsbøn. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við Tummas Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti við Tummas Jacobsen, kl. 22 útimøti við Feladelfia. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 18 evangeliskt møti.

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Heimasíða okkara: www.koma.fo

Kvívíkar kirkja
Leygarkvøldið kl. 19.30 Summartónar við tveimum violinum (Øssur Bæk og Rúni Bæk).

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18 samkomufundur. Mánakvøldið kl. 20 bíbilog bønarmøti.

Vestmanna missiónshús
Sunnudagin kl. 18 møti við teim 4 úr Havn.

Útimøti
Heimamissiónin hevur útimøti í Kaldbak leygardagin kl. 20.30 við sangbólkinum Gittit o.ø.

Filadelfia, Sundalagið
Sunnukvøldið kl. 18 kvøldmøti við Rúna Rasmussen.

Keldan, Skálafirði
Hóskvøldið opið hús kl. 20 við Paula Høj. Sunnukvøldið kl. 19 møti við húsbólkinum hjá Alice og Jónhard. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Lívsins Orð
Seminar um opinberingina verður leygardagin kl. 9-14.30 við Ed Brancamp, trúboðara úr Letlandi. Sunnudagin kl. 10.30 verður møti við Ed Brancamp.

Soli Deo Gloria
Mikumorgunin kl. 06 bøn. Leygarmorgunin kl. 09 bøn saman við Getsemane. Sunnudagin kl. 18 møti. Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Missiónshúsið í Vági
Sunnukvøldið kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 13-15.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 25. juni:
kl. 9.45-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-12 Prát um »Dagur í viku« ið verður 20.8.-24.8. 2001.
kl. 15.30 **Almennur fundur.** Hvat skal/kann Tjarnagarður (Marinustøðin) nýtast til? **Øll hugskot eru vælkomin**. Nevndin, ið arbeiðir við Tjarnagarði verður við.
Týsdagin 26. juni:
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 **Fyrireiking til Ólavsøku.**
Mikudagin 27. juni:
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Vit vitja lívsverkið á Ternuryggi hjá sambýlinum á Bóndaheyggi – Jarvin F. Hansen, sigur frá. Tilm. mánadag. tlf. 316491
Hósdagin 28. juni:
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11-17 Opið hús
Fríggjadagin 29. juni:
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða í kvøld kl. 20–21 og 22.30-23.30.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

Blái Krossur
bjóðar til eftirviðgerð hvørt mánakvøld á skrivstovuni á Bláa Krossi á Glyvrum, kl. 20-21.30. Nærri fæst at vita á tlf. 315575.

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Telduposturt lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn
uttanlands, tlf. 21 04 95. Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

MBF-skrivstovan
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373

Javni
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí. Ringjast kann til ein av nevndarlimunum.
Eirikur Dam, tlf. 422087
Jógvan Elias á Løgmansbø, tlf. 317686
Jarvin Feilberg Hansen, tlf. 320237
Malena Arnholdsdóttir, tlf. 441395
Diana í Puntabyrgi, tlf. 316510 – fax 310557
email: punta@post.olivant.fo

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Telduposturt: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Giktafelag Føroya
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Lýst verður tá opið verður aftur.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.-olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík
Møtini byrjaðu 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25, 6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C. Tlf.: 25395563
Telduposturt: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438
Gudni tlf. 47387748

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Telduposturt: fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Húsið er opið mánadag til hósdag kl. 16-18 og fríggjakvøld kl. 21-03. Føroysku bløðini liggja frammi. Kaffi er ókeypis. Flogbóltur í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16-18. Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30. Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) frá kl. 11-14.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyingafelagið í Svøríki
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570

Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

Føroyingar í Noregi
E-mail: foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.n-orden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

PRÓGV

Juliet Trúgvadóttir, Strendur, hevur 19. juni lokið prógv sum lærari á Holbæk Seminarium.

Erling Isholm, Tórshavn, hevur fingið prógv sum cand. mag. í søgu og norðurlendskum frá Fróðskaparsetri Føroya.

BRÚDLEYP

Hósdagin 21. juni *giftust* Leila og Kaj Eli Olsen, Leirvík.

Leygarmorgunin 30. juni kl. 08 giftast í Vesturkirkjuni Sigvør Lamhauge og Poul Beder, Tórshavn.

gult31 cyan31 magenta31 svart31

FILMSTEIGURIN

Quills

Tølandi pennurin hjá Marquis de Sade
Donatien Alphonse Francois de Sade, ella Marquis de Sade, sum livdi frá 1740 til 1814, er við sínum provokerandi og pornografisku verkum ein tann mest kontroversielli persónurin í europeiskum bókmentum yvirhøvur.
Marquis er næsthægsta enska aðalheitið, meðan orðið sadisma er sprottið úr eftirnavni hansara de Sade. Sadisma merkir at fáa kynsligt njótilsi av at pína onnur.
Orsakað av sínum provokerandi verkum, var Marquise de Sade stóran part av ævi síni í fongsli, og tey seinastu trettan árini var hann innistongdur á sinnissjúkrastovni.
Tað er á slíkum stovni, hann er at finna í filminum. Marquis de Sade verður spældur av Geoffrey Rush. Leiðari á sinnissjúkrastovninum Charenton, sum de Sade er innistongdur á, er tann toleranti abbatin de Coulmier, spældur av Joaquin Phoenix. Og sjálvandi eru eisini kvinnur uppií. De Sade verður stuðlaður í at smugla verk síni út av tí vakru vaskigentuni Madeleini, spæld av Kate Winslet.
Men myndugleikarnir koma uppí, og tann harðrendi dr. Royer-Collars (Michael Caine) verður sendur til Chasrenton og skal fyri einhvønn prís steðga de Sade........

The Animals

Eitt banabrótandi kirurgisk inngreb við djóragøgnum bjargar ikki bara lívinum hjá Marvin Mange (Rob Schneider) eftir eina ógvusliga ferðsluvanlukku…
Skjótt hevur Marvin Mange styrki sum ein leyva, uppfærir seg sum ein chimpansa. Lívið hjá honum broytist totalt, og tað minnir ikki sørt um lívið í einum djóragarði. Filmurin hevur forpremieru í Havnar Bio í kvøld



Undanfrumsýning – (Frumsýning 6. juli)
Sunnudagin 01.07. kl. 22[00]

Fríggjadagin 29.06. kl. 23[00] Leygardagin 30.06. kl. 23[00]
Sunnudagin 01.07. kl. 22[00]

www.in.fo/havnarbio

HAVNAR BIO
☆ Tlf. 3119 56 ☆



Undanfrumsýning – (Frumsýning 14. september)
Fríggjadagin 29.06. kl. 23[00] Leygardagin 30.06. kl. 23[00]

☆ BIO KIOSKIN ☆
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

Fríggjadagin 29.06. kl. 20[30] Leygardagin 30.06. kl. 20[30]
Sunnudagin 01.07. kl. 19[00]

Fríggjadagin 29.06. kl. 21[00] Leygardagin 30.06. kl. 21[00]
Sunnudagin 01.07. kl. 20[00]